Álit

í

løgtingsmáli nr. 191/2010: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012

Landsstýrið hevur lagt málið fram hin 31. mars 2011, og eftir 1. viðgerð 7. apríl er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. apríl 4., 5., 6., 9., 11., 13., 18., 25. og 27 mai 2011

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Stóri trupulleikin í almenna búskapinum er, at seinastu 10 árini eru útreiðslur landskassans vaksnar skjótari enn inntøkurnar. Hetta hevur økt munandi um skuld landskassans. Neyðugt er tí at tálma vøkstrinum í útreiðslunum. Fyri at almenna nýtslan skal virka stimbrandi, hevur Fíggjarnevndin valt at økja almennar íløgur, men steðga vøkstrinum í rakstrinum. Soleiðis fæst møguleiki fyri, tá vøkstur verður í búskapinum, at tað almenna fær minkað munandi um skuldina.

Fíggjarnevndin er tí samd um, at tann samlaði karmurin fyri komandi 5 árini skal verða:

Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012

Mió. Kr.	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**
Rakstur	4.562,9	4.511,4	4.435,0	4.378,8	4.326,0
Løgur	315,0	315,0	315,0	315,0	315,0
Útreiðslurkarmur	**4.877,9**	**4.826,4**	**4.750,0**	**4.693,8**	**4.641,0**
Inntøkukarmur	**4.433,0**	**4.491,4**	**4.565,0**	**4.653,8**	**4.751,0**
herav rentuútreiðslur	*88,0*	*119,0*	*142,0*	*146,0*	*143,0*
RLÚ-úrslit	**-444,9**	**-335,0**	**-185,0**	**-40,0**	**110,0**

Fíggjarnevndin er samd um, at málið í 2016 má verða at fáa í minsta lagi eina 3-siffraða millióna upphædd í yvirskoti soleiðis, at tað almenna kann byrja at gjalda niður sína stóru skuld.

Hóast Fíggjarnevndin er samd um tann samlaða karmin, so er Fíggjarnevndin ikki samd um, hvussu býtið verður. Nevndin hevur tí býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Annita á Fríðriksmørk, Tórbjørn Jacobsen, Eyðgunn Samuelsen, Bjørn Kalsø, Magni Laksáfoss) mælir tinginum til at taka undir við niðanfyristandandi tilmæli um, hvussu játtanarkarmarnir skulu skipast í 2012 og ætlanini um, hvussu játtanarkarmarnir skulu ásetast árini fram til og við 2016, tá meirilutin metir, at vit aftur skulu miða eftir einum avlopi á Løgtingsins fíggjarlóg. Harafturat er meirilutin vorðin samdur um eina almenna løguætlan fyri árini 2012-2016.

Leistur fyri fíggjarkarmarnar 2012 – 2016
Ein semja um karmarnar er í veruleikanum ein semja um býti av inntøkum og útreiðslum. Í høvuðsheitum er talan um fýra lyklatøl, sum eru:

Inntøkur – Rakstur – Løgur = RLÚ

Á vári 2010 varð semja gjørd í Løgtinginum um gongdina í RLÚ og Løgum. Harvið eru tvey lyklatøl eftir, nevniliga Inntøkur og Rakstur. Neyðugt er einans at semjast um annaðhvørt Inntøkur ella Rakstur, tí tá annað er lagt fast, gevur hitt seg sjálvt.

Upplagt er at nýta semjuna, sum Landsstýrið hevur lagt fram á ting. Trupulleikin er, at landsstýrið er komið við eini semju við einum ovurhonds stórum ógreinaðum posti.

(Gevið gætur, at talan er um tøl í føstum prísum, tvs. hædd er ikki tikin fyri prís- og lønarvøkstri.)

Landsstýrið	2011	2012	2013	2014	2015	2016
Inntøkur	4.257	4.513	4.583	4.649	4.716	4.785
Rakstur	-4.529	-4.575	-4.621	-4.667	-4.713	-4.761
Løgur	-235	-280	-280	-280	-275	-275
Rentur	-39	-88	-119	-142	-146	-143
Ógreinað	0	0	136	290	418	393
RLÚ	-546	-429	-300	-150	0	0

Politiska støðan hevur seinastu tíðina verið rættuliga fløkjaslig. Javnaðar- og Sambandsflokkurin samdust um uppskot til karmar sum Fólkaflokkurin ikki tók undir við. Úrslitið varð at Fólkaflokkurin fór úr samgonguni. Eftir hetta hava Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin saman við Tjóðveldi gjøgnumgingi uppskotið og gjørt nakrar smávegis broytingar. Meirilutin eru samdur um at seta fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012 verður 4.877,9 mió. kr. Rakstrarkarmurin er 4.562,9 mió. kr., og løgukarmurin er 315,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.433,0 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir býttir á greinar og ár.
Løgtingið verður gjørt varugt við, at til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012, er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framskrivingunum og tey neyðugu tiltøkini, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum frá fíggjarmálaráðnum og í hesum álitinum og hjáløgdu Búskaparfrágreiðing I.

(Upphæddirnar í talvuni eru í føstum prísum. Tað merkir, at í tann mun at prís- og lønarvøkstur er í samfelagnum broytast upphæddirnar samsvarandi.)

Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012					
Mió. kr.	*2012*	*2013*	*2014*	*2015*	*2016*
Rakstur					
§ 1 Løgtingið	44,6	44,1	43,3	42,8	42,3
§ 2 Løgmansfyrisitingin	16,0	15,8	15,6	15,4	15,2

§ 3 Fíggjarmál	416,5	411,8	404,8	399,7	394,9
§ 5 Fiskivinnumál	158,9	157,1	154,4	152,5	150,7
§ 6 Vinnumál	291,6	288,3	283,4	279,8	276,5
§ 7 Mentamál	928,2	917,7	902,2	890,7	880,0
§ 11 Heilsumál	896,0	885,9	870,9	859,8	849,5
§ 12 Almannamál	1.666,3	1.647,5	1.619,6	1.599,1	1.579,8
§ 15 Innlendismál	105,5	104,3	102,5	101,2	100,0
§ 16 Uttanríksmál	39,3	38,9	38,2	37,7	37,3
Útreiðslur tilsamans	***4.562,9***	***4.511,4***	***4.435,0***	***4.378,8***	***4.326,0***
Løgur					
§ 1 Løgtingið	-	-	-	-	-
§ 2 Løgmansfyrisitingin	2,5	2,5	2,5	2,5	2,5
§ 3 Fíggjarmál	-	-	-	-	-
§ 5 Fiskivinnumál	30,0	55,0	90,0	0,0	0,0
§ 6 Vinnumál	5,0	0,0	0,0	0,0	0,0
§ 7 Mentamál	113,2	118,5	117,5	145,6	95,0
§ 11 Heilsumál	48,5	44,0	49,1	48,0	98,0
§ 12 Almannamál	33,5	32,1	0,0	22,5	11,0
§ 15 Innlendismál	82,3	62,9	55,9	96,4	108,5
§ 16 Uttanríksmál	-	-	-	-	-
Útreiðslur tilsamans	***315,0***	***315,0***	***315,0***	***315,0***	***315,0***
Útreiðslurkarmur	**4.877,9**	**4.826,4**	**4.750,0**	**4.693,8**	**4.641,0**
§ 20 Inntøkur	4.433,0	4.491,4	4.565,0	4.653,8	4.751,0
Inntøkukarmur	**4.433,0**	**4.491,4**	**4.565,0**	**4.653,8**	**4.751,0**
RLÚ-úrslit	**-444,9**	**-335,0**	**-185,0**	**-40,0**	**110,0**

Viðmerkingar
Semja er í politisku skipanini um, at hallið á fíggjarlógini skal avmarkast mest møguligt og vera burtur í 2015 / 2016.
Samsvarandi hesum mælir meirilutin til fylgjandi broytingar í mun til uppskotið hjá landsstýrinum:

- Broytingaruppskotið leggur upp til eina betran av rakstrinum á 20 mió. kr. í 2012, harav 8 mió. kr. í nýggjum inntøkum og 12 mió. kr. í minni vøkstri í rakstrinum.
- Løgukarmurin er hækkaður í 315 mió. um árið, úr 280 mió. kr. í árunum 2012-2014 og 275 mió. kr. í árunum 2015-2016.
- Fyri at fara undir niðurgjalding av almennu skuldini, er minstakravið fyri avlopið í 2016 hækkað úr 0 til 110 mió. kr.
- Fyri at sleppa undan at hava ógreinað tiltøk í langtíðarætlanini er avgjørt, at 1/5 av ógreinaðu tiltøkunum skulu finnast á inntøkusíðuni, meðan 4/5 skulu finnast sum rationaliseringar, effektiviseringar og sparingar innan almenna raksturin.
- Semja er um, at í tann mun at vøksturin í inntøkunum gerst betri enn mett, skal helvtin koma hallinum til góðar og helvtin skal brúkast til at minka um tiltøkini á inntøku- og útreiðslusíðunum.
- Í íløgukarminum er serligur dentur lagdur á, at farast skal undir at byggja Fróðskaparsetur og Tjóðsavn, umframt at Tjóðleikhúsið er raðfest frammarlagari enn í ætlanini hjá landsstýrinum. Frákoyringin á Skála er tikin við undir Tygdartiltøk á grein 15.

Býtið á íløgukarminum fyri 2012-2016 er annars soleiðis:

Mió. kr.	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**
§2						
Umbygging í Tinganesi	1,5	2,5	2,5	2,5	2,5	2,5
§2 tilsamans	**1,5**	**2,5**	**2,5**	**2,5**	**2,5**	**2,5**
§5						
Nýtt havrannsóknarskip	25,0	30,0	55,0	90,0	0,0	0,0
§5 tilsamans	**25,0**	**30,0**	**55,0**	**90,0**	**0,0**	**0,0**
§6						
Granskingarlund	10,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Skúvoyarferja	0,0	5,0	0,0	0,0	0,0	0,0
§6 tilsamans	**10,0**	**5,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**
§7						
Tekniski skúli í Klaksvík	5,0	5,0	7,0	6,0	5,0	0,0
Norðurdepilin	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Skúladepil við Marknagil	38,5	77,5	95,0	95,0	114,8	0,0
Studentaskúlin í Hoydølum	3,0	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Fróðskaparsetur Føroya	0,0	1,3	0,0	0,0	7,0	35,0
Tjóðleikhús	5,0	5,0	7,0	7,0	7,0	30,0
Tjóðsavn	0,0	1,4	0,0	0,0	1,8	20,0
Hvalastøðin við Áir	2,5	4,0	4,0	4,0	10,0	10,0
Kirkjubømúrurin	2,0	1,0	0,5	0,5	0,0	0,0
Kringvarpshúsið	0,0	5,0	5,0	5,0	0,0	0,0
Ítróttarhøll í Sandoynni	10,0	11,0	0,0	0,0	0,0	0,0

§7 tilsamans	**66,0**	**113,2**	**118,5**	**117,5**	**145,6**	**95,0**
§11						
Apoteksverkið	4,8	5,2	0,0	0,0	0,0	0,0
Medicoteknisk tól	11,0	7,2	8,0	9,1	12,0	11,0
Landssjúkrahúsið	28,0	30,0	30,0	35,0	35,0	86,0
Klaksvíkar sjúkrahús	1,1	5,0	5,0	5,0	1,0	1,0
Suðuroyar sjúkrahús	2,5	1,1	1,0	0,0	0,0	0,0
§11 tilsamans	**47,4**	**48,5**	**44,0**	**49,1**	**48,0**	**98,0**
§12						
Dugni skúlin	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Bústovnar	10,6	33,5	32,1	0,0	22,5	11,0
§12 tilsamans	**12,6**	**33,5**	**32,1**	**0,0**	**22,5**	**11,0**
§15						
Umvæling av alm. bygningum	24,0	26,5	28,0	28,0	30,0	30,0
Oljudálking á sjónum	0,5	0,6	1,0	0,0	0,0	0,0
Dagføring av brúm og tunlum	4,0	3,2	4,0	4,0	8,0	7,1
Innkoyringarvegur til Tórshavn	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	4,0
Trygdartiltøk og størri ábøtur	5,0	5,0	5,0	5,0	9,0	9,0
Vegagerð í Lervík	18,0	26,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Rituvíkarvegurin	6,5	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Kalsoy	3,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Søla av jørð til kommunur	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1
Viðareiðisloysn	5,0	3,0	9,0	4,0	32,5	6,5
Vegurin omanfyri Skálafjørð	0,0	10,0	10,0	10,0	5,0	5,0
Vegurin til Selatraðar	0,0	4,0	4,0	3,0	0,0	0,0
Havnin í Skúvoy	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Bakkaverja Fámjin	0,3	1,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Flogferðsla, tyrlupallur	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Hvalbiartunnilin	0,0	1,1	0,0	0,0	10,0	40,0
Sandoyartunnilin	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0	5,0
§15 tilsamans	**72,2**	**82,3**	**62,9**	**55,9**	**96,4**	**108,5**
Løguútreiðslur	**234,7**	**315,0**	**315,0**	**315,0**	**315,0**	**315,0**

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Bill Justinussen) hevur hesar viðmerkingar.

Politiska skipanin stendur yvir fyri einum av størstu avbjóðingunum nakrantið. Fyri at framtíðartryggja vælferðina hjá okkara fólki er alneyðugt at fáa hallið á fíggjarlógini burtur. Minnilutin dugir ikki at síggja, at føroysku familjurnar og vinnulívið orka meira skatt og avgjøld. Tí er neyðugt at gera skynsom rasjonaliseringstiltøk, sum halda aftur við útreiðslum samstundis, sum vit mugu leggja doyðin á vakstrartiltøk. Í ætlanini hjá minnilutanum eru ongur skatta- og avgjaldshækkingar. Vit mugu vaksa okkum til javnvág.

Eins og øll húsarhald, eigur almenna húsarhaldið fyrst at hyggja eftir, hvussu nógvan pening vit hava, og síðan seta útreiðslurnar eftir hesum. Seinnu árini hava verið merkt av stutttíðar tiltøkum, sum eisini hava ávirka tey veiku í samfelagnum. Minnilutin leggur doyðin á, at við at áseta samlaðu útreiðslurnar fyri 5 ár fram ber til hjá landsstýrinum at

tryggja teimum veikastu í samfelagnum betri kor. Tað eigur at vera fremsta uppgávan hjá politiska myndugleikanum í truplum tíðum.

Minnilutin mælir til, at vit áleggja almennum stovnum somu treytir, sum privata vinnan leggur á seg sjálvan. Minnilutin heldur, at allir almennir stovnar fáa boð um at rasjonalisera 2% um árið næstu 5 árini. Hetta eigur at gerast við at betra arbeiðsgongdir, nútímansgera og samskipa almenna bygnaðin betur. Hetta hevur verið roynt við donskum almennum stovnum við góðum úrsliti.

Eisini er neyðugt at gera reformar, sum kunnu tryggja, at vit í minsta lagi fáa tað sama fyri minni.

Ein samd nenvd mælir til ein hækkaðan løgukarm, sum næstu árini skal verða 300 millónir úm árið. Hetta eisini fyri at tryggja virksemi í landinum. Minnilutin fegnast um hetta, men mælir tó til broyttan løgukarm í mun til meirilutans.

Umframt hækkaðan løgukarm mælir minnilutin eisini til eina vakstrarætlan, sum skal skapa fleiri inntøkur. Higartil hevur politiska skipanin havt ov nógv orð og ov lítla gerð. Í tíðum sum hesum er neyðugt at brúka nakað av peningi, sum kann skapa arbeiðspláss í vakstrarvinnum. Minnilutin mælir til, at 20 mió. kr. verða settar av árliga næstu 5 árini til at skapa vøkstur við.

Peningurin eigur at brúkast til m.a. meira marknaðarføring av Føroyum sum ferðavinnuland, marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum umframt marknaðarføring av Føroyum sum íløguland. Løgtingið hevur samtykt uppskot um at fáa gongd á aftur framleiðslu av útlendskum fiski, og heldur meirilutin, at partur av vakstrarjáttanini eigur at brúkast til hetta.

Minnilutin heldur eisini, at vit eiga seta í verk skipan við tíðaravmarkaðum skattafrádrátti fyri handverkararaløgnir á egnum bústaði. Tað skapar virksemi, arbeiðspláss, og samstundis minkar skipanin um svart arbeiði. Hetta er roynt i Svøríki og Finlandi við góðum úrsliti. Danska stjórnin hevur júst boðað frá, at semja er um somu skipan í Danmark.

Verður uppskotið samtykt, eigur landsstýrið at útgreina vakstrarætlanina nærri til fíggjarlógaruppskotið í heyst.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Bill Justinussen) setir tí fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012 verður 4.849 mió. kr. Rakstrarkarmurin er 4.549 mió. kr., og løgukarmurin er 300,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.419 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir býttir á greinar og ár.

Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2011-2016					
Mió. kr.	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**
Inntøkur, §20:					
Inntøkur frá vakstrarætlan	20,0	20,0	20,0	20,0	20,0
Rentuútreiðslur netto, §20	-88,0	-119,0	-142,0	-146,0	-143,0
Inntøkur tilsamans	**4.433,0**	**4.491,4**	**4.565,0**	**4.653,8**	**4.751,0**

Rakstrarútreiðslur, §1-§16:					
Vakstrarætlan	-20,0	-20,0	-20,0	-20,0	-20,0
Rastrarútreiðslur tilsamans	**-4.562,9**	**-4.511,4**	**-4.435,0**	**-4.378,8**	**-4.326,0**
Løguútreiðslur, §1-§16	**-315,0**	**-315,0**	**-315,0**	**-315,0**	**-315,0**
RLÚ-úrslit	**-444,9**	**-335,0**	**-185,0**	**-40,0**	**110,0**

Viðmerkingar:

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Bill Justinusen) hevur í sínum uppskotið valt at hava høvuðstøl á útreiðslum, inntøkum, løgum og RLÚ. Játtanarskipanin sigur, at tað skal býtast á greinar fyri øll 5 árini. Fíggjarnevndin hevur konstaterað, at landsstýrið hevur ikki fylgt hesi áseting í sínum uppskoti. Tí heldur minnilutin, at andstøðan í Løgtinginum ikki hevur neyðugu amboðini at býta út á karmar. Um uppskot minnilutans verður samtykt, eigur landsstýrið í uppskoti til fíggjarløgtingslóg í heyst at býta útreiðslurnar á greinar fyri øll 5 árini.

Við løgum hevur minnilutin lagt dent á virkisskapan og virksemi kring landið. Mest virksemisskapandi løgur eru viðlíkahald av almennum ognum, og eigur hesin partur tí at vaksa. Somuleiðis heldur minnilutin, at vit í løguætlan eisini skulu tryggja virksemi kring landið. Minnilutin mælir tí til, at løgukarmurin á grein 15 verður hækkaður, meðan aðrar greinar samlað verða minkaðar samsvarandi.

Løguætlan fyri 2012-2016						
Tús. kr.	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**
§2						
Umbygging í Tinganesi	1,5	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
§2 tilsamans	**1,5**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**
§5						
Nýtt havrannsóknarskip	25,0	30,0	55,0	90,0	0,0	0,0
§5 tilsamans	**25,0**	**30,0**	**55,0**	**90,0**	**0,0**	**0,0**
§6						
Granskingarlund	10,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Skúvoyarferja	0,0	5,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Nólsoyarferja	0,0	0,0	0,0	0,0	20,0	20,0
§6 tilsamans	**10,0**	**5,0**	**0,0**	**0,0**	**20,0**	**20,0**
§7						
Tekniski skúli í Klaksvík	5,0	10,0	10,0	10,0	0,0	0,0
Skúladepil við Marknagil	38,5	75,0	75,0	75,0	75,0	82,1
Studentaskúlin í Hoydølum	3,0	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Tjóðleikhús	5,0	2,0	2,0	3,0	3,0	34,0
Hvalastøðin við Áir	2,5	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Kirkjubømúrurin	2,0	1,0	0,5	0,5	0,0	0,0
Ítróttahøll í Sandoynni	10,0	11,0	0,0	0,0	0,0	0,0
§7 tilsamans	**66,0**	**105,0**	**91,5**	**92,5**	**82,0**	**120,1**

§11						
Apoteksverkið	4,8	5,2	0,0	0,0	0,0	0,0
Medicoteknisk tól	11,0	7,2	8,0	9,1	12,0	11,0
Landssjúkrahúsið	28,0	30,0	30,0	35,0	35,0	35,0
Klaksvíkar sjúkrahús	1,1	6,0	5,0	5,0	1,0	1,0
Suðuroyar sjúkrahús	2,5	1,1	1,0	0,0	0,0	0,0
§11 tilsamans	**47,4**	**49,5**	**44,0**	**49,1**	**48,0**	**47,0**
§12						
Dugni skúlin	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Bústovnar	10,6	33,5	32,1	0,0	23,1	11,0
§12 tilsamans	**12,6**	**33,5**	**32,1**	**0,0**	**23,1**	**11,0**
§15						
Umvæling av alm. bygningum	24,0	35,0	35,0	34,0	35,0	35,0
Oljudálking á sjónum	0,5	0,6	1,0	0,0	0,0	0,0
Dagføring av brúm og tunlum	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Innkoyringarvegur til Tórshavn	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	5,0
Trygdartiltøk	5,0	4,3	4,0	5,0	5,0	5,0
Vegagerð í Lervík	18,0	18,0	8,0	0,0	0,0	0,0
Rituvíkarvegurin	6,5	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Kalsoy	3,0	2,0	3,0	3,0	3,0	3,0
Søla av jørð til kommunur	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1	-0,1
Viðareiðistunnil	5,0	10,0	20,0	20,0	60,0	25,0
Tunnil Norð um fjall	0,0	0,0	0,0	0,0	5,0	5,0
Íbinding á Skála	0,0	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Vegurin oman fyri Skálafjørð	0,0	3,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Havnin í Skúvoy	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Bakkaverja Fámjin	0,3	0,7	0,0	0,0	0,0	0,0
Flogferðsla, tyrlupallur	2,0	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Hvalbiartunnilin	0,0	11,5	12,5	12,5	15,0	15,0
Samferðsluloysn í Svínoy	0,0	1,0	0,0	0,0	0,0	0,0
Sandoyartunnilin	0,0	0,0	0,0	0,0	10,0	15,0
§15 tilsamans	**72,2**	**92,0**	**92,4**	**83,4**	**141,9**	**116,9**
Løguútreiðslur	**234,7**	**315,0**	**315,0**	**315,0**	**315,0**	**315,0**

Harumframt hevur (**Annita á Fríðriksmørk, Tórbjørn Jacobsen**) hesar viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fyri ásetta evstamarkið lagt fram uppskot til samtyktar um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina 2012, - býtt út á greinir. Samstundis gjørdist greitt, at vit fingu eitt valdsskifti í politiska geiranum. Ósemja var eitt nú um omanfyrinevnda uppskot, og úrslitið gjørdist, at Føroyar í nakrar vikur hava verið stjórnaðar av eini minnilutastjórn. Avleiðingarnar av hesi støðu eru tí, at andstøðan hjá minnilutastjórnini er í meiriluta í Løgtinginum og soleiðis eisini í Fíggjarnevndini. Harvið fyriliggur ein ógreið støða, sum kann tulkast soleiðis, at tað er ongin sjálvsøgn, at ein meiriluti ella øll Fíggjarnevndin ber uppskotið hjá landsstýrismanninum óbroytt ígjøgnum til álits. Undir hesum umstøðum er tí alneyðugt, at nevndin finnur eitt grundstøði og setir

sær nøkur greið búskaparpolitisk mál fyri sínum virki, nú farið verður undir at leggja grundarlagið fyri fíggjarlógina næsta ár (2012) og at stinga út í kortið, hvagar leiðin gongur tey næstu árini til og við 2016.

Gongdin higartil

Búskaparpolitiska stjórnanin av Føroyum hevur verið heldur trilvandi og ofta tilvildarlig. Hetta mundi vera høvuðsorsøkin til, at Løgtingið samtykti at geva sær sjálvum og útinnandi valdinum eitt amboð at stjórna fíggjarlógunum og búskapinum við. Úrslitið gjørdist Játtanarlógin, sum varð sett í gildi í mai 2009. Tað er ógvuliga umráðandi, at meginreglurnar í slíkari lóg verða staðfestar í verki beinanvegin soleiðis, at skeivar siðvenjur ikki taka seg upp, sum við tíðini kunnu amputera ætlaða amboðið. Tað er ikki ov nógv sagt, at útinnandi valdið (Fmr) higartil er farið lætt um lógina. Teirra leiklutur er viðgjørdur í Landsstýrismálanevndini, tí er ongin orsøk til at endurtaka ta viðgerðina í hesum skrivi. Hinvegin hevur Fíggjarnevndin, sum nú situr, verið ógvuliga tilvitað um, at okkara gerðir í mun til Játtanarlógina fara at hava stóran týdning fyri næsta ættarliðið av politikarum, tí tað er nú, at leisturin verður snikkaður til, sum gerst grundarlagið undir framtíðar siðvenjum.

Hóast tað onkuntíð stóð nógv á millum partarnar í nevndini, so eydnaðist tað eini samdari nevnd í fjørvár at fremja eina semju um játtanarkarmarnar fyri verandi ár. Umframt at karmurin varð lagdur fyri 2011, varð ein ætlan gjørd fyri, hvussu búskaparpolitiska gongdin skuldi verða fram til og við 2015. Í ætlanini varð staðfest, at hallið á fíggjarlógini, í eini javnari gongd, skuldi vera burtur hetta sama árið.

Fíggjarnevndin mælti til hesa hóvligu gongd fram ímóti eini javnvág, fyri at samfelagið ikki skuldi fara úr spónalagnum, hóast hon var vælvitandi um, at skuldin hjá landskassanum kom at vaksa hetta tíðarskeiðið og at rentubyrðan harvið eisini var vaksandi.

Moody´s Investors Service

Landsstýrið hevur í nøkur ár brúkt búskapar- og fíggjarliga metingarstovnin Moody´s Investors Service til at meta um megina í føroyska búskapinum. Nýggjasta fráboðanin er ikki meira enn nakrar vikur gomul, og Moody´s kritar trupulleikarnar av, sum føroyski búskapurin hevur í sær, eitt nú ein vantandi fiskivinnupolitikk. Teir hava ikki lagt merki til nøkur politisk átøk frá landsstýrinum, sum venda rætta vegin, men eyðsýniliga hava teir lagt merki til, at Fíggjarnevndin - og harvið Løgtingið - hava tikið sær um reiggj fyri at stegða støðuga hallinum á fíggjarlógunum við hesum orðum: *"The deficit reduction plan (approved by the Faroese Parliament) projects deficits till 2015, financed through a moderate increase of the stock of debt. Moody's cautions that even if the government achieves lower deficits than expected, there is no strong political impetus to shorten the budget rebalancing period."*

Hetta kundi bent á, at niðurstøðan og politiska avgerðin hjá Løgtinginum í fjør er orsøkin til, at metingarstovnurin sær ein ávísan vilja til at rudda upp í skeivu javnvágini, og at man hartil var og er sinnaður til at leggja eina ætlan fyri, hvussu málið skal røkkast. Hinvegin hava teir ikki álit á, at landsstýrið fer at minka um hallið skjótari, skuldi tað hent, at inntøkurnar vaksa skjótari enn væntað. Moody´s ávara eisini um, at Føroyar kunnu fara ein ella fleiri karakterir niður á skalanum, um vit ikki taka betri partar fyri okkum: *"If Moody's perceives that the Faroe Islands will face difficulties in rebalancing its finances and achieving the Parliament's approved deficit reduction plan, this could result in a downward rating adjustment of one or more notches."*

Status
Tað er ógvuliga umráðandi, at hildið verður fast um skipanina við játtanarkarmum. Áður enn henda skipan gjørdist veruleiki, var støðuga undanførslan fyri, at føroyska skipanin var ein politiskur tíðarlummi, har onki kundi broytast ella reformerast, tann, at stundir ikki vóru fyri at gera neyðuga lógarverkið, sum skuldi til fyri, at neyðugar og átrokandi rasjonaliseringar kundu fremjast. Hugsanin við kørmunum er umframt langtíðarperspektivið á 5 ár, at landsstýrisfólkini, sum sita fyri málsøkjunum, hava rímiliga tíð til at fyrireika seg politiskt, lógliga og í kunngerðum til tann avmarkaða karmin, sum á hvørjum ári verður settur fyri nýtsluna og raksturin árið eftir, at tingið hevur samtykt fæið, viðkomandi hevur at ráða yvir. Úrslitið av førda fíggjar- og búskaparpolitikkinum seinastu mongu árini er avmyndað í mynd 1, har útreiðslurnar vaksa við munandi størri ferð enn inntøkurnar, soleiðis at seinastu árini er avlop vent til hall.



Mynd 1

Umsiting Løgtingsins hevur gjørt nakrar viðmerkingar til løgtingsmál nr. 191/2010.
Í notatinum verða metingar gjørdar um, hvussu uppskotið og búskaparfrágreiðingin um játtanarkarmar standa í mun til Játtanarlógina, og kritikkurin er ikki til at fara skeivur av. Hann er lemjandi og staðfestir, at landsstýrinum vantar vilja til at brúka meginamboðið í búskapar- og fíggjarstýringini – Játtanarlógina. Niðurstøðan er greið: *"Samanumtikið so verður ikki mett, at frágreiðingin lýkur tær treytir, sum settar eru í játtanarlógini."*

Um tað er tilvitað ella orsakað av dugnaloysi er ikki til at siga. Men eitt er víst, at tess størri er ábyrgdin hjá Løgtinginum, at taka sær betri partar fyri, soleiðis, at samfelagið verður bjargað undan einum komandi bankarotti, sum kann gerast endin, um verandi gongd heldur fram ótarnað. Umsiting Løgtingsins hevur gjørt eina framrokning av hallinum, har tøl, sum ongar politiskar bindingar hava í skipanini, eru barberað burtur. Ein framrokning, sum sýnir gongdina, um ongi politiskt átøk verða gjørd fyri at fremja javnvágirnar aftur. Úrslitið er, at hallini á fíggjarlógunum tey næstu árini, ið hvussu er fram til 2016, fyri tað mesta verða væl omanfyri eina hálva milliard um árið. Harvið verður skuldin hjá teimum

almennu Føroyum ímillum 3 og 4 milliardir størri enn í dag. Við eini vaksandi rentubyrðu, einum vaksandi rentustøði og versnandi kredittvirði er hetta ein gongd, sum má steðgast.

Landsstýrið, sum nú situr, hevur eftir øllum at døma ikki havt nakrar ætlanir um at gera nakað við trupulleikan. Annars hevði tað neyvan lagt eitt so ógreinað og politikkleyst uppskot fram um játtanarkarmar, sum løgtingsmál nr. 191/2010 í roynd og veru er. Hinvegin kann realpolitiska støðan, nú vit á fyrsta sinni royna eina politiska leið við eini minniluta heimastýrissamgongu, vera umberingin fyri hesi støðu, tí landsstýrismaðurin kendi í útgangsstøðinum ikki parlamentariska meirilutan, ið skuldi bera uppskotið ígjøgnum á tingi.

Hvagar gongur leiðin?
Annars er støðan nærum ein endurtøka av støðuni í fjør. Harvið ber til at endurtaka partar av arbeiðsskjalinum, Fíggjarnevndin samdist um sum grundarlag undir viðgerðini fyri ári síðan.

Eitt og hvørt tíðarskeið í søguni hevur havt sínar heilt serligu avbjóðingar fyri samfelag og politiskar skipanir. Játtanarlógin, sum kom í gildi í mai 2009, er eitt amboð hjá politisku skipanini at strukturera arbeiðið við fíggjarlógunum soleiðis, at mann ikki einans hyggur eitt ár fram í tíðina, men leggur ætlanir fyri fleiri ár í senn. Í hesum sambandi skal framlagdi játtanarkarmurin vísa politisku ætlanirnar at taka hond um tær avbjóðingar, sum síggjast í havsbrúnni, - so langt sum tað politiska eygað kann skoða.

Ymiskar tilgongdir
Metodan ella tilgongdin til at finna neyðugu loysnirnar á samfelagsligu avbjóðingunum verður sera ymisk í broytingaruppskotinum frá Fíggjarnevndini í mun til upprunauppskot landsstýrisins. Meðan upprunauppskotið í størsta mun hevur tikið støði í einum einstakum ári, nevniliga 2012, fer broytingaruppskotið hjá Fíggjarnevndini at taka støði í heildini í øllum tíðarskeiðnum 2012-2016.

Hildið verður, at rættast er fyrst at síggja búskapin í eini heildarmynd yvir eitt tíðarskeið, fyri síðan eftirfylgjandi at hyggja nærri at einstøku árunum.

Meirilutin er í broytingaruppskotinum samdur um yvirskipaða politikkin, nevniliga at hallið á fíggjarlógini skal basast fram til 2015, og at miðað verður eftir einum yvirskoti á 150 mió. kr. í 2016, meðan ósemja sjálvsagt hevur verið, alt eftir partapolitskum observansi, um á hvønn hátt málið um yvirskot í 2016 skal røkkast.

Hallið á fíggjarlógini skal minkast
Størsta avbjóðingin er, at hallið á fíggjarlógunum er avbera stórt og tykist ikki at minka av sær sjálvum komandi árini. Avbjóðingin er at fáa minkað um hallið, samstundis sum neyðug atlit verða tikin fyri, at arbeiðsloysið ikki veksur óneyðuga nógv, og at vinnuliga virksemið mennist.

Bara minni parturin av stóru hallunum hjá landskassanum stava frá altjóða búskaparkreppuni og tí turbulensi, sum altjóða samfelagið er farið ígjøgnum hesi seinru árini. Ongin ivi er um, at størri parturin stavar frá vantandi ella skeivari politiskari stýring seinastu mongu árini, heilt síðan kreppan rakti samfelagið fyrst í nítiárunum. Tey fyrstu árini stýrdu ásettar neyðugar kreppuloysnir samfelagnum, og tá politikkurin, føroyskt fólkaræði, fekk frælsi til at stjórna landinum aftur, var trupult at finna búskaparligt fótafesti, og síðani eru almennu útreiðslurnar støðugt vaksnar. Harvið tykist tað, sum eitt taxametur finst inni í skipanini, sum ongin megnar at temja.



Mynd 2

Hetta sæst sjónliga á myndini ***(mynd 1)***, sum vísir avlop og hall á landsroknskapinum árini 1998-2011. Árini 2000 og 2001 vóru avlopini stór, ein natúrlig gongd eftir eina djúpa kreppu. Hóast útreiðslurnar øktust við risafetum, rann tað skjótari inn í kassan frá einum óvanliga stórum búskaparvøkstri. Men seinnu árini hava víst alsamt størri hall. Undantakið frá hesi gongd eru árini 2006 og 2007, har stóra fíggjarliga ekspansjónin, bæði í almenna og privata geiranum, gav landskassanum munandi størri inntøkur og harvið eitt lítið avlop.

Hallið í 2008, 2009 og 2010 eigur tí ikki at koma óvart á nakran og stavar í stóran mun frá egnari stýring og í ávísan og minni mun frá altjóða búskaparkreppuni.

Viðmerkjast kann, at meðan onnur lond eisini hava stór hall í almenna rakstrinum, stava hesi hall í stóran mun frá almennum hjálpartiltøkum og sonevndum automatiskum stabilisatorum, bjargingarátøkum, meðan hallið í Føroyum í nógv størri mun stavar frá sonevndum bygnaðarligum skeivleikum, har útreiðslurnar eru ov stórar í mun til inntøkugrundarlagið.

Brotna linjan í myndini omanfyri vísir upprunauppskotið fyri einum ári síðan, soleiðis sum landsstýrið legði tað fram, meðan heila linjan vísir broytingaruppskotið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini í fjør.

Politiski hugburðurin í fyriliggjandi uppskoti er ikki broyttur nevnivert, hóast landsstýrismaðurin er ein annar. Vandin var, og hann er framvegis hin sami, at um Løgtingið velur at fylgja upprunauppskotinum, fer skuldin at vaksa ov nógv í komandi árum, og harvið vil rentubyrðan tyngja raksturin sera nógv. Niðurstøðan er, at sparingar og djúptøknir reformar mega fremjast, um framtíðar vælferðin skal tryggjast.

Tí vóru tankarnir aftanfyri broytingaruppskotið í fjør, at táið tað er eyðsýnt, at neyðugt er at fáa størri javnvág í almenna raksturin, er rættast at seta kósina móti javnvágini innanfyri eina rímiliga framtíð. Málið hevur verið, at javnvág skal verða í rakstrinum aftur í 2015. Hetta er framvegis málið. Hartil setir Fíggjarnevndin sær nú fyri, at yvirskot skal verða á fíggjarlógini í 2016, - á í minsta lagi 110 mió. kr.

Málið um fíggjarliga javnvág í 2015 kann tykjast nakað óambitiøst, tí javnvág á fíggjarlógini minkar ikki um skuldina – til tað krevst eitt avlop á fíggjarlógini. Skuldin fer harafturímóti at vaksa, og ivasamt er, um uppdriftin í samfelagnum megnar at gjalda samantaldu skuldina aftur, táið javnvág aftur er fingin á fíggjarlógini. Hildið varð tó, at inntrivini fram til 2015 í broytingaruppskotinum seinasta ár vóru nóg stór til at tryggja, at almenni búskapurin ikki kollsiglir, samstundis sum tey ikki eru størri enn, at vælferðin verður varðveitt. Her kann nevnast, at í tann mun, at tað eyðnast at fremja rationaliseringar av almenna rakstrinum soleiðis, at "meiri kann fáast fyri minni", fara sparingarnar als ikki at merkjast sum nøkur minking í vælferðini, men einans sum ein minking í útreiðslunum.

Vøksturin í almennu skuldini má avmarkast

Føroyar hava áður upplivað avleiðingarnar av alt ov stórari almennari skuld. Á líknandi hátt síggja vit nú, hvussu Ísland, Írland, Spania, Portugal, Grikkaland og onnur europeisk lond merkja avleiðingarnar av ov stórari almennari skuld. Hetta er als ikki nøkur ynskistøða at vera í hjá nøkrum landi. Lond við stórari almennari skuld uppliva, hvussu vælferðin verður skift út við rentugjaldingar. Hetta er ein støða, tey kundu havt verið fyri uttan, um tey høvdu framt neyðugu tiltøkini i góðari tíð.

Umráðandi er hjá okkum í Føroyum at sleppa undan stórari almennari skuld soleiðis, at vælferðin eisini kann tryggjast ókomnum ættarliðum í framtíðini. Samstundis er rætt at taka hond um støðuna skjótast gjørligt, soleiðis at sleppast kann undan mest møguligari skuldarbinding.



Mynd 3

Myndin omanfyri sýnir almennu skuldina í mun til BTÚ. Hon vísir, hvussu almenna skuldin fer at økjast í upprunauppskotinum, og hvussu vøksturin í skuldini steðgar, sambært broytingaruppskotinum hjá Fíggjarnevndini í fjør. Støðið er tikið í almennari nettoskuld, sum her er definerað sum landskassaskuldin minus innistandandi í Landsbankanum. Nettoskuldin veksur til út við 40 prosent av BTÙ í 2015 sambært upprunauppskotinum í fjør/í ár. Broytingaruppskotið hjá Fíggjarnevndini fyri ári síðan avmarkar vøksturin til 28 prosent, síðan minkar hann líðandi.

Viðmerkjast kann, at um støðið í staðin verður tikið í bruttoskuldini, fer hon vaksa til omanfyri 40 prosent í broytingaruppskotinum og omanfyri 50 prosent í upprunauppskotinum.

Virksemisskapandi tiltøk
Samstundis, sum neyðugt er at minka um vøksturin í almennu útreiðslunum fyri at skapa javnvág aftur á fíggjarlógunum, er eisini neyðugt at tryggja, at virksemið í landinum ikki heilt steðgar upp, men at nakað av virksemisskapandi tiltøkum verða framd.

Upprunauppskotið í fjør hevði sett 188 mió. kr. av til íløgur í 2011, og ætlanin var at vaksa hetta til 225 mió. kr. í eftirfylgjandi árum. Hetta varð mett at vera í minna lagi, og var tí í broytingaruppskotinum lagt upp til, at íløgurnar vaksa til 300 mió. kr. í 2011 fyri síðan at minka nakað aftur komandi árini.

Hugsanin er, at á henda hátt kann virksemið tryggjast tey fyrstu truplu tvey til trý árini, meðan løgurnar minka aftur tey seinru árini, tá størri dentur verður lagdur á at minka um hallið, fyri at gjalda skuldina niður aftur.



Mynd 4

Hesin hugsunarháttur er væl kendur úr búskaparfrøðini, har virksemisskapandi íløguvirksemi verður sett í gongd í truplum tíðum, fyri síðan at minka eftirfylgjandi fyri at gjalda skuld niður.

Orsøkin til, at tað júst er íløguvirksemið, ið verður økt í truplum tíðum, er, at meðan íløgurnar kunnu økjast og minkast við stuttum skotbrái, er munandi verri at økja og minka um almenna raksturin. Tað sigur seg sjálvt, at tað ikki er gjørligt t.d. at opna ellisheim í ringum tíðum fyri at steingja tey aftur, tá tíðirnar gerast betur.

Saman við virksemisskapandi íløgum eigur politiska skipanin eisin at umhugsa tiltøk, sum kunnu seta ferð á vinnuhjólini. Landsstýrið eigur ikki at sita hendur í favn og lata arbeiðsloysistrupulleikan í hendurnar á Arbeiðsloysisskipanini eina. Neyðugt er, at landsstýrið er virkin viðleikari bæði hjá ígongdsetarum og nýggjum vinnuspírum eins og

hjá siðbundnum vinnum, sum liggja tungt í sjónum. Alt er betri enn arbeiðsloysi. Lítil virðisøking er betri enn ongin virðisøking. Tí eigur landsstýrið at fara aktivt til verka, eggja til og politiskt at skipa grundleggjandi karmar fyri virksemisskapandi átøkum.

Umstøður kunnu broytast
Í sambandi við, at politisk mál verða sett fyri komandi árini, er ein áhugaverdur spurningur, hvussu politikkurin skal broytast, um tað skuldi víst seg, at búskaparstøðan gerst munandi betri enn mett.

Her er stór semja um, at meðan uppskotni fíggjarpolitikkurin frá Fíggjarnevndini einans fer minka um hallið soleiðis, at tað er burtur í 2015, eigur langtíðarætlanin at vera, at landskassin eigur at hava eitt munagott avlop, soleiðis at skuldin kann gjaldast aftur.

Meirilutin er samdur um karmarnar fyri fíggjarárið 2012 soleiðis, sum teir eru ásettir í álitinum. Eftir tað (2013-2016) er semja um eitt býti á 80-20% til ávikavíst rakstur og inntøkur fyri ógreinaðu upphæddirnar og skuldi búskaparvøksturin blivið størri enn tann metti í uppskotinum, er semja um, at meirvøksturin verður býttur eftir lyklinum 50-50%. Tvs., at helvtin skal koma hallinum til góðar, meðan hin helvtin kemur rakstrinum til góðar.

Einaferð enn: Hvagar gongur leiðin?
Føroyska samfelagið kann ikki í langa tíð rekast við einum upp á seg gigantiskum halli. Ein hálv milliard í halli, ein vaksandi skuldarbinding á hálva milliard og meira um árið og hartil ein skjótt vaksandi rentubyrða er ein givin deyðskós fyri føroyska búskapin. Uppdriftin til at javnviga hesi gongd finst ikki av sær sjálvari, tí er neyðugt við politiskum átøkum, ið kunnu temja hesa skeivu gongd beinanvegin.

Løgtingsmál nr. 191/2010 gevur okkum onki svar um, hvussu komast skal burturúr hallgevandi støðuni. Eitt ógreinað tilfeingisgjald broytir onki; tað veksur bara um inntøkurnar og ger onki við galopperandi úrtreiðslurnar. Ógreinaðu rasjonaliseringarnar á útreiðslusíðuni gera ikki støðuna minni trupla. Hetta er eitt politiskt vacuum, vit mega fáa bilbukt við beinanvegin. Veruligi trupulleikin er jú, at útreiðslurnar, almenni parturin av føroyska búskapinum, eru vorðnar ov stórar í mun til uppdriftina hjá teimum, ið skulu gjalda.

Tað er onki at fara eftir hjá vanliga føroyska skattaborgaranum. Hann er so sperdur og knokkroyttur frammanundan, er við at drukna í persónsskatti og avgjøldum, at spurningurin er heldur, um stundin ikki er komin til at minka um skattin hjá arbeiðsmegini. Hópurin av skattafríum inntøkum í landinum kann eisini vera kveikingin til, at skatta- og avgjaldsviðurskiftini verða tikin upp til orðaskiftis av nýggjum.

Vit standa tí frammanfyri einum vali, har hvørgin kosturin er mjúkur. Í slíkum tíðum er meiri neyðugt at hugsa búskaparliga rætt heldur enn í partapolitiskum termum. Valið kann í ringasta føri standa ímillum bjarging ella bankarott.

Leiðin burturúr trupulleikanum er reformasjón og afturhald í almennu útreiðslunum samstundis, sum íløgur verða gjørdar, fyri at vaksandi talið av arbeiðsleysum føroyingum kann koma í vinnu aftur. Hetta krevur, at rikin verður ein veruligur vinnupolitikkur, at ein fiskivinnureformur verður framdur, sum tekur støði í optimalari stovnsrøkt, og at alt tilfeingi kemur til høldar. Og harumframt, at aðrir reformar, sum hava ligið á láni í alt ov langa tíð, verða settir í verk eftir skipaðum leistum. Uppgávan er møgulig, og nú er stundin

komin, har Løgtingið skal vísa fólkinum, um tað er merglopið ella nóg mergjað til at fáa Føroyar á føtur aftur.

Fyritreytin undir ætlanini er veruligir politiskir reformar
Velur politiska skipanin ikki at gera annað enn at lata standa til tey næstu árini, verður hallgevandi gapið ímillum inntøkur og útreiðslur at vaksa, sum lýst í strikumyndini niðanfyri.



Mynd 5

Bláa strikan er gongdin í skuldarstøðuni um ongi politisk átøk verða framd soleiðis, sum framrokningarnar í Búskaparfrágreiðing 1 (frá FMR) vísa, og reyða strikan er gongdin, um leiðin hjá meirilutanum í Fíggjarnevndini verður fylgd.

Skal skuldarstøðan stabiliserast er neyðugt við munandi politiskum átøkum. Meirilutin er samdur um, at politiska skipanin hesi umrøddu árini helst skjótast møguligt fer undir at gera munagóðar umbótanir - reformar - á:

- fiskivinnupolitiska økinum. Tað ræður um at umskipa lóggávuna á økinum soleiðis, at stovnsrøktin verður optimal. At alt tilfeingi verður fingið til høldar. At virðisøkingin í Føroyum verður optimerað. Veiðiorkan skal skipast eftir lívfrøðiligu tilmælunum, fyri at høvuðsvinnan kann geva neyðuga íkastið til samlaða búskapin. Hetta merkir eisini, at fiskivinnan frameftir gerst leys av almennum stuðli, eitt nú verður avmarkaða skattafrítøkan hjá føroyskum fiskimonnum tikin aftur umvegis eina skiftistíð.

- kommunalpolitiska økinum. Ein kommunalreformur broytir av sær sjálvum ikki útreiðslustøðið í almenna geiranum, men hóast tað, er hann eitt neyðugt stig fyri at loysa elligamlar og skeivar strukturar, og samstundis fer hann at slóða fyri øðrum bygnaðarbroytingum, m.a. á eldra- og skúlaøkinum, sum við tíðini fara at hava við sær, at almenna fæið fer at verða brúkt meira skynsamt.

- vinnu- og útbúgvingarpolitiska økinum. Neyðugt verður at skipa ein offensivan vinnupolitikk í samskipan við útbúgvingarpolitikkin, sum málrættað leggur seg eftir at vaksa um hjávinnur, relateraðar til fiski- og alivinnuna.

- almenna økinum yvirhøvur. Støða má takast til, hvussu rasjonaliserast skal í almenna geiranum. Støða má takast til, hvørji øki neyðturviliga skulu verða verandi í almenna geiranum og hvørji møguliga kunnu leggjast til privata geiran av ráða yvir. Støða má eisini takast til, hvussu vit kunnu umskipa landsumsitingina, skúlaøkið, almannaøkið og heilsuøkið, sum tilsamans umboða meira enn ¾ av almennu útreiðslunum hjá Føroyum.

- á útbúgvingarøkinum. Meirilutin í nevndini mælir í íløgukarmunum til, at ferð verður sett á at skipa eitt veruligt universitet í Føroyum. Endamálið er at førleikamenna ungar føroyingar mest møguligt í landinum, og av royndum aðrastaðni vita vit, at ein veruligur lærdur háskúli kann gerast kraftkervið, vit í so stóran mun hava tørv á.

- rentustuðulsøkinum. Skipanin eigur lagaliga yvir eitt rímilgt áramál at verða tikin av. Húsalánsgrunnurin eigur aftur at kunna vera eitt amboð á sethúsamarknaðinum, og landsstýrið eigur av álvara at fara undir greiningar, sum kunnu gera av, um ein føroyskur realkredittstovnur skal skipast til sethúsamarknaðin.

- orkuveitingar- og orkutrygdarøkinum. Hesi eru faktorar, sum eisini teljast millum stóru búskaparligu avbjóðingar landsins. Innfluningurin av brennievni liggur omanfyri milliardina ella á leið ein fjórðingur av føroyska innflutninginum. Hetta ger búskapin sera viðbreknan fyri hækkandi oljuprísum.

  Hóast oljuprísirnir seinastu tíðina eru falnir nakað, so bendir alt á, at fossilu brennievnini í framtíðini áhaldandi fara at dýrka. Vit fingu ein beiskan brellbrita, sum ábending um, hvussu oljuprísurin kann fara at jarðleggja okkara høvuðsvinnu, tá oljuprísurin eitt skifti lá um 150 dollarar fyri tunnuna. Samstundis siglur interkommunala orkufelagið SEV í fíggjarligum tungum sjógvi, og mangt bendir á, at felagið fær tað trupult við einsamalt at lyfta uppgávuna at flyta okkum yvir í eitt varandi-orkurikið samfelag. Tað rakar bæði vanliga húsarhaldið og vinnuna ómetaliga meint, at streymprísirnir áhaldandi hækka. Neyðugt er at gera vart við, at landskassin má vera til reiðar at gera fíggjarligar íløgur í orkutrygd, soleiðis at vit skjótari koma burtur frá bindingini at oljuni. Júst hvussu tað skal gerast, eigur landsins leiðsla at hava eitt greitt boð uppá.

  Løgtingið samtykti við løgtingsmáli 134/2008, at ferð skuldi setast á menningina av varandi orkukeldum, og sum part av hesum, at landsstýrið í sínum fíggjarlógaruppskoti fyri 2010 og komandi árini skuldi koma við boði uppá, hvussu hetta kann raðfestast. Men, higartil hevur landsstýrið ikki sett seglini til, at røkka hesum málsetningi.

Harumframt hava **Eyðgunn Samuelsen og Bjørn Kalsø** hesar viðmerkingar: Fíggjarkarmarnir fyri 2012 – 2016 snúgva seg um, hvussu vit meta framtíðarútlitini fyri okkara samfelag. Hvørjar fíggjarligar, búskaparligar og sosialar avbjóðingar liggja fyri framman, og hvussu vit loysa hesar avbjóðingar á ein hátt, sum kann tryggja og menna eitt framkomið vælferðarsamfelag.

Minnilutin metir, at høvuðsavbjóðingarnar eru arbeiðsloysi, ov lítil búskaparvøkstur yvir tíð og stóra hallið á fíggjarlógini. Politiska avbjóðingin verður tí at vinna á hesum trupulleikum uttan at økja um arbeiðsloysið og skerja vælferðina umframt at skapa grundarlag fyri øktum búskaparvøkstri.

Hallið á fíggjarlógini hevur verið stórt árini 2009, 2010 og 2011. Neyðugt er tí at venda gongdini frá halli til yvirskot eftir 4-5 árum fyri at fyribyrgja, at vit enda í eini skuldar- og rentufellu, sum í ringasta føri kann fara at hava fólkafráflyting við sær.

Neyðugt verður tí at vísa varsemi komandi árini við at halda almennu útreiðslunum niðri uttan tó at gera ógvuslig inntriv, sum kunnu geva ein hvøkk í búskapin skeiva vegin, og sum kunnu fyribeina neyðugum vælferðartænastum, sum bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin raðfesta frammarlaga .

Almennu rakstrarútreiðslurnar eiga tí at haldast niðri við at effektivisera og rasjonalisera almenna sektorin komandi árini soleiðis, at meir fæst fyri minni.

Minnilutin heldur, at gongdin kann vendast komandi fimm árini soleiðis, sum lagt verður upp til í broytta uppskotinum um rakstrarkarmar, um átøk verða gjørd, sum kunnu skapa búskaparvøkstur og basa arbeiðsloysinum samstundis, sum vit vísa varsemi og afturhaldni í almennu útreiðslunum.

Skulu vit koma burtur úr verandi lágkonjukturi og fáa hallið á fíggjarlógini burtur, er neyðugt

- at skapa góðar vinnukarmar fyri verandi og nýggjar vinnur
- at gera íløgur í útbúgving og gransking, ikki minst útbúgvingartilboð til ófaklærd
- at vit brynja samfelagið til at loysa avbjóðingar á orku- og umhvørvisøkinum og
- at dentur verður lagdur á at gera arbeiðsskapandi íløgur, sum munnu minka um arbeiðsloysið í byggivinnuni.

Hjálagda uppskot til álit um játtanarkarmar fyri 2012 tekur støði í uppskotinum hjá landsstýrinum við smávegis broytingum, sum í høvuðsheitum hava við sær, at rakstrarútreiðslurnar minka við 12 mió. kr., inntøkurnar hækka við 8 mió. kr. og íløgurnar hækka við 35 mió. kr. í mun til uppruna uppskotið.

Dentur er lagdur á at fara undir íløgur, ið eru virksemisskapandi og harvið koma at økja munandi um virksemið í byggivinnuni kring landið. Dentur er somuleiðis lagdur á, at íløgurnar, sum verða framdar, ikki skulu økja stórvegis um raksturin.

Á heilsuøkinum halda út- og umbyggingarnar á Landssjúkrahúsinum fram, farið verður undir fyrireikingar at byggja nýggjan Psykiatriskan Depil, og neyðugar umvælingar og umbyggingar verða gjørdar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi komandi trý árini. Á almannaøkinum verða bústovnar til fólk við serligum tørvi bygdir í Norðoyggjum og Eysturoy.

Á útbúgvingarøkinum verða íløgur gjørdar í m.a. Miðnámsskúlan í Marknagili og Tekniska Skúlan í Klaksvík.

Ætlanin er somuleiðis at útvega annað skip til Skúvoyarleiðina fyri Sildberan, og farið verður undir at gera trygga farleið til Viðareiðis. Somuleiðis verður skjøtil settur á at fyrireika Sandoyartunnilin í 2016. Ætlanin er eisini at gera íløgur á mentanarøkinum, umframt at fitt av peningi verður settur av til umvælingar og viðlíkahald av almennum bygningum.

Tørvurin og ynskini til íløgur eru stór á so at siga øllum greinum á fíggjarlógini. Øll øki í landinum kunnu somuleiðis vísa at teirra tørv og grundgeva fyri, hví júst teirra øki eigur tørn júst nú. Í hesum sambandi kann verða sera trupult at gera røttu raðfestingarnar, tá tíðarskeiðið er so stutt, sum talan er um í fyriliggjandi uppskoti til samtyktar um játtanarkarmar.

Minnilutin heldur tí, at besta loysnin hevði verið at gjørt ein breiða politiska semju um langtíðaríløgukarmar, sum fevndi yvir longri tíðarskeið, t.d. 10-15 ár heldur enn 5 ár. Tí eigur landsstýrið ikki at sleppa ætlanini um at fáa í lag eina breiða semju um langtíðaríløguætlanina hjá landinum, nú farast skal undir at gera uppskot til fíggjarlóg fyri 2012 at leggja fyri Løgtingi í heyst.

Harumfram hevur (**Magni Laksáfoss**) hesar viðmerkingar:

Við semjuni um fíggjarkarmarnar fyri 2012-2016 hevur politiska skipanin veruliga tikið seg inn í eitt nýtt tíðarskeið í politisku søguni. Ikki einans eru nú fyri fyrstu ferð lagdir karmar um ein samanhangandi langtíðarfíggjarpolitikk, har atlit verða tikin til búskaparstøðuna og kredittvirðið hjá føroyska samfelagnum, men eisini eru atlit tikin til einstøku partarnar av landinum og politikkin á øðrum økjum.

Moody's: Politikkurin má gerast betri
Tá Moody's fyri góðum mánaði síðani kom við síni rating av føroyska fíggjarpolitikkinum, var hetta ikki hugnaligur lesnaður. Skotsmálið var, at fíggjarpolitikkurin var so ábyrgdarleysur, at ratingin mátti lækka, og at útlitini vóru fyri, at ratingin fór at lækka enn meiri komandi tíðina, við vanda fyri at renta á almennu skuldina fór at hækka. Hetta er ikki nøkur ynskistøða fyri nakað samfelag. Høvuðsgrundgevingarnar hjá Moody's vóru, at politiska skipanin tyktist ikki sinnað at loysa teir tveir stóru knútarnar í samfelagnum, nevniliga hallið á landskassanum og trupulleikarnar í fiskivinnuni. Við semjuni um framtíðar fiskivinnupolitikkin og hesi semjuni um fíggjarkarmarnar tykist ein loysn vera funnin á báðum málunum.

Kósin burtur úr hallinum er løgd
Við fíggjarkørmunum er ein greið kós løgd fyri, hvussu hallið á landskassanum skal fáast burtur. Loysnin er, at 80 prosent av neyðuga peninginum skal finnast við at fremja umleggingar, rasjonaliseringar og sparingar innan almenna geiran, og hini 20 prosentini skulu finnast við nýggjum inntøkum. Í veruleikanum merkir hetta, at almenni sektorurin fer at minka nakað komandi árini, tó so varisliga, at hetta neyvan merkir stórvegis uppsagnir, men í stóran mun kann klárast við natúrligari frágongd.
Samstundis er kósin løgd móti at fremja broytingar innan almennu skipanirnar soleiðis, at serskipanir vera avtiknar, og skattagrundarlagið verður breiðkað soleiðis, at inntøkuskatturin neyvan fer at hækka komandi árini, men heldur er lagt upp til eina lækking av persónliga inntøkuskattinum.

Samanumtikið er talan um eina framúr góða semju, har sleppast kann burtur úr hallinum uttan stórvegis avleiðingar fyri einstaka borgaran.
Viðmerkjast kann, at minnilutauppskotið hjá Miðflokkinum og Fólkaflokkinum liggur so tætt upp at uppskotinum hjá meirilutanum, at talan fyri so vítt er um sama uppskot, og merkir hetta, at full semja er í politisku skipanini um kósina burtur úr hallinum.

Vaksa um virksemisskapandi løgurnar
Fyri at avmarka arbeiðsloysið komandi árini er løgukarmurin øktur úr uml. 280 mió. kr. í 315 mió. kr. árliga. Stórur dentur er lagdur á, at fremja løgur í verandi virksemi soleiðis, at løgurnar ikki hava stóran, nýggjan rakstur við sær. Orsøkin til hetta er, at tá raksturin av almenna geiranum skal minka komandi árini, er umráðandi at vera umhyggin við, hvat fyri virksemi verður sett í gongd.
Dømi um tílíkar løgur eru Havrannsóknarskip, Tjóðleikhús, Fróðskaparsetur, Tjóðsavn, skúlan við Marknagil, umbygging av Landssjúkrahúsinum, umvæling av almennum bygningum og ymsar vegagerðir.
Dentur er eisini lagdur á, at seta virksemi í gongd runt um í landinum. Soleiðis er løguvirksemi í

- Vágum við útbygging av flogvøllinum
- Norðstreymoy við umvæling av Hvalastøðini
- Eysturoy við bygging av bústovnum og ymsum vegastrekkjum
- Norðoyggjum við umvæling av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Tekniska Skúla, tunlum í Kalsoy og ymisk vegastrekki
- Sandoy við bygging av ítróttahøll
- Suðuroy við Saltsilo, bakkaverju og Hvalbiartunli
- Suðurstreymoy við Landssjúkrahúsi, Skúla við Marknagil, Fróðskaparsetri, Tjóðleikhúsi, Tjóðsavni

Samanumtikið er talan um eitt rímiliga javnt geografiskt býti av løgunum, tó við eini yvirvág í miðstaðarøkinum. Hetta kann neyvan vera øðrvísi, tá hugsað verður um, at tað er illa hugsandi at íløgurnar, sum nevndar eru at vera í Suðurstreymoy, kunnu gerast aðrastaðni í landinum, tí tær natúrliga liggja í Miðstaðarøkinum.

Løgurnar bera okkum framá
Umframt omanfyri nevndu kriteriir fyri býtinum av løgunum, er dentur lagdur á at gera løgur, sum bera samfelagið framá. Løgurnar í Havrannsóknarskipið kann geva okkum vitan, sum kann vísa seg at vera sera virðismikil í komandi samráðingum við onnur lond um býtið av fiskastovnum. Løgurnar í miðnámsskúlan og Fróðskaparsetrið er ein íløga í framtíðar arbeiðsmegina í Føroyum og er somuleiðis sera virðismikil.
Samanumtikið er talan um ein væl samansettan løgukarm, sum skal vísa sítt virði komandi árini.

Fíggjarnevndin, 27. mars 2011

Jørgen Niclasen formaður	Eyðgunn Samuelsen næstformaður	Bjørn Kalsø

Magni Laksáfoss Bill Justinussen Tórbjørn Jacobsen

Annita á Fríðriksmørk